


Sethús | Virkisbygningar | Umvælingar | Seruppgávur

## Búsetur søkir eftir skrivstovulærlingi

Søkt verður eftir lærlingi til skrivstovuna/bókhaldið, sum er í Tórshavn at byrja 2. januar 2011.
Hjá Búsetur eru vit 40 starvsfólk, sum arbeiða í einum jaligum og vælskipaum umhvørvi. Vit brúka nýmótans telduskipanir sum t.d. Navision Attain, LøttLøn og Microsoft forrit.

**Vit ynskja, at tú:**

- hevur FHS ella HH
- dugir vanliga handilsrokning og at skriva føroyskt
- hevur góð samstarvsevnir
- ert fleksibul
- ert fyrikomandi og ágrýtin

Sum skrivstovulærlingur kemur tú at møta fjølbroyttum avbjóðingum og at læra skrivstovu- og bókhaldsarbeiði.
Send tína umsókn við CV og avritum av viðkomandi skjølum **innan 5. desember til:**

**Búsetur spf**, Box 2100, 165 Argir
ella til durita@busetur.fo

Tú kanst fáa meiri at vita um størvini við at venda tær til Duritu Djurholm á durita@busetur.fo
ella tlf 355830/230833.

BÚSETUR
Tel 355 830 | www.busetur.fo





Ítróttarsosialurin altíð við har tað hendir



## Avgreiðslufólk til BankNordik

BANKNORDIK

**BankNordik sóknast eftir starvsfólki til avgreiðsluøkið í Deild Tórshavn.**

Uppgávur fevna um at avgreiða ørindi hjá kundum og at tryggja telefonkundum eina dygdargóða og einsháttaða tænastu.

Tú ert fram um alt tænastusinnað/ur. Tað er umráðandi, at tú ert fyrikomandi og hevur lætt við at samskifta við fólk. Tú vísir forstáilsi og innliving, tá tú avgreiðir kundan og tú hevur hug til at fremja virkna kundarøkt um telefonina.

Vilt tú vita meira, kanst tú venda tær til Anju Rein, leiðara á avgreiðsluøkinum, á telefon 330 330 ella á ar@banknordik.fo.

**Umsóknarfreistin er mánadagin 6. desember 2010.**

Send tína umsókn við avritum av CV og viðkomandi skjølum til:
BankNordik, Húsagøta 3, Postboks 3048, 110 Tórshavn,
Att. Starvsfólkadeildin ella til starvsfolk@banknordik.fo.

**Les meira á www.banknordik.fo/starv**

SENDISTOVAN




Dagfinnur Danbjørg

**Kjak**

# Peopels Party

*Sovandi vakna ein fyri og annar eftir:*

**Óli:** Skjalafalsan? - Apartheid? - Nýnazisma? - Pina og skett í Chile?...... Margareth og.........Hann hjálpi mær!!!!
**Poul svarar í ørviti:** Grønlandsísur í veðurlagsbroytingum.
**Annfinn støkkur upp:** Lagurfusk ella -fisk?
**Jørgin gnýggjar eyguni:** Privatiseraðar flakamaskinur?
**Jacob:** Ella pappírsleysar roknskaparkva lifikatiónir?
**Bjarni:** Nú, nú - ongar avdúkandi viðmerkingar!
Rødd syngur spakuliga, men intenst: Sonur mín, sonur mín.......................
**Jákup rópar:** Bjarni er longu hongdur.
Fjølmiðlarnir hava longu hongt hann.
**JógvanvK suffar:** Aftur til kommunismuna.
**JógvanáL febrilskur:** Ákalli 266b - ella 666 - ella tríeinigheitina ella onkran.
**Jørgin:** ....ella Westergård.
**Poul:** Eg orki ikki meira eftir 40 árum í oyðimørkini.
**Annfinn loypur upp og geylar:** Stongið allar hurðar fyri Poul. Hvíluleysur skal hann fjakka um í allar ævir.
**JógvanáL:** Eins og Jeruslemas skógmakari. Takk og finito.
Og soleiðis loysti Peopels Party teirra trupulleikar.


